# Bjargaði fólki úr søkkandi báti

**HAVSNEYÐ** Tá Magni Garðalíð sunnukvøldið var á veg aftur á Syrðadal úr Leirvík, heilsaði hann upp á bát, ið lá og fiskaði. Løtu seinni fekk hann boð um at koma til hjálpar, tí báturin var um at søkka

Leo Poulsen

Sunnukvøldið bjargaði Magni Garðalíð fimm fólkum frá at noyðast í bjargingarbát og einum 27 fót frítíðarbáti at søkka.

– Vit høvdu havt gestir og sigldu teir so yvir til Leirvíkar aftur um kvøldið. Á veg aftur til Syðradals sóu vit ein bát, ið eg helt vera svág mín. Tá vit so komu nærri sá eg, so var ikki. Men vit heilsaðu upp á og hildu so fram til Syðradals, sigur Magni Garðalíð.

Tey høvdu ikki meiri enn bundið bátin og vóru farin í bilin á veg til Húsar, har tey búgva, tá telefonin ringdi, og tey vórðu boðsend at koma til hjálpar, tí báturin tók sjógv inn.

– Vit vendu so beinanvegin, og loystu bátin aftur. Vit sigldu skjótt, so tað gingu bara einir fimm minuttir, til vit vóru hjá bátinum, sigur Magni Garðalíð.

Veðrið var av tí allarbesta, so tað lá væl fyri at leggja at søkkandi bátinum og taka fólkið úr honum.

– Vit settu so á bátn og sleipaðu hann inn á Syðradal, har pumpur vórðu fingnar umborð. Tá var nógvur sjógvur í bátinum, og motorurin var undir, sigur Magni Garðalíð.

Báturin var staddur millum Galvin og Syrðadal, einar 300 metrar úr landi.

Tá báturin so var lensaður, varð hann sleipaður til Klaksvíkar, har hann var tikin upp á land.

## Takksom

Magni Garðalíð heldur, at tað var heppið, at tey vóru so nær við og at fólkið umborð á bátinum vistu, at tey kundu fáa hjálp frá teimum beinanvegin.

– Skjót hjálp er góð hjálp. Vit vóru ógvuliga skjótt á staðnum, og tá vóru tey longu í ferð við at rigga bjargingarbátin til. Og eg má siga, at tey tóku støðuna ógvuliga róliga, tí tað vóru ongantíð tekin til panikk, sigur Magni Garðalíð.

Hann metir, at var hann ikki komin so skjótt til hjálpar, so hevði stórur vandi verið fyri, at fólkið umborð á bátnum noyddist í bjargingarbátin og 27 fót frítíðarbáturin sakk.

– Tú hugsar bara um at hjálpa, tá soleiðis er statt, og eg eri bara glaður fyri, at eg kundi verða so skjótt á staðnum, sigur Magni Garðalíð.

Og eisini tey, ið bjargað blivu, vóru fegin um skjótu hjálpina, og vístu sína tøkk, tá tey mikudagin komu á keiina í Syrðadali, har Magni Garðalíð hevur støð fyri ferðamannabáti sínum, Viljin.

– Ja, eg má siga tað var ein rørandi løta, tá tey komu har á keiina og handaðu mær og konuni eina gávu, eitt ur í part, sigur Magni Garðalíð.

Hann ynskir ikki at gera tað stóra hóvastákið burtur úr hendingini, men er bara fegin um, at hann kundi hjálpa hetta sunnukvøldið, tá tey fimm fólkini vóru í ferð við at fara í bjargingarbátin.

# Føst upphædd fyri ansing

**BARNAANSING** Kvívíkar kommuna skal nú gjalda fast gjald fyri válabørn, sum verða ansað í Vestmanna kommunu

Randi Jacobsen

Seinastu árini hevur Kvívíkar kommuna umframt ansingargjaldið goldið 10 prosent av rakstarútreiðslunum hjá dagstovninum í Vestmanna, har børn av Válinum hava verið ansað. Válurin er í Kvívíkar kommunu.

Kvivíkingar hava hildið rokningina vera í so stóra, og á fundi týskvøldið samtykti kommunustýrið í Vestmanna at leggja um til eina nýggja og einfaldari skipan. Nú er krónutal sett á.

Við hesum sleppur Kvívíkar kommuna væl bíligari. Higartil hevur hon goldið 4800 krónur um mánaðin, og nú fer rokningin niður á 2000 krónur.






*Ólavur Thorsteinsson skal í ár stýra stóru Ólavsøkukonsertini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ólavur skal stýra ólavsøkukonsertini

Ólavur Thorsteinsson er settur sum samskipari av ólavsøkukonsertini í ár. Umframt hevur hann eisini verið hjálparsamskipari av Ung í Arbeiði hjá Tórshavnar Kommunu.

Ólavur, sum eisini er kendur frá Scrub.Art, sum hann og Bárður D. Christiansen manna, samskipar konserttiltakið, ið sum vant verður tann 27. juli. Umframt sjálva konsertina á útipallinum, verður Perlan eisini partur av tiltakinum, og har verður Undirbeat. Í Reinsarínum er ætlanin at hava uppkomandi bólkar.

Høvuðsnavnið á Ólavsøkukonsertini 2010, er danski bólkurin Duné, sum millum annað hava vunnið stórar virðislønir sum t.d. P3 prisen, Gaffa prisen og Danish Music Awards. Duné eru í løtuni á turné í Europa.

Føroysku bólkarnir, sum fara á pallin, eru vælkend nøvn; Páll Finnur Páll, Guðrið Hansdóttir, Bet You Are William, Crawling Blue og Jens Marni Hansen.

Konserttiltakið er, sum nakað nýtt, partur av tiltøkunum, sum Tórshavnar Kommuna skipar fyri á ólavsøku.

dagfinn@sosialurin.fo